# Kunngerð um Mentanargrunn Landsins, sum broytt við kunngerð nr. 156 frá 12. desember 2017

Við heimild í § 4 í løgtingslóg nr. 84 frá 17. mai 2000 um Mentanargrunn Landsins verður ásett:

*Endamál*

**§ 1.** [1)] Mentanargrunnur Landsins veitir stuðul til tey í § 1 í løgtingslógini nevndu endamál, undir hesum starvslønir, listafólkalønir, íverksetanarstuðul, styttri skeið hjá listafólkum og stuðul til ymiskar verkætlanir.

*Stk. 2.* [1)] Mentanargrunnur Landsins kann harumframt eftir umsókn stuðla bókaútgávur og tónleikaútgávur upp til 30% av útgávukostnaðinum.

*Stk. 3.* Vísindaligt arbeiði, framsýningar, framførslur o.l. kunnu eftir umsókn fáa stuðul.

*Nevndin*

**§ 2.** [1)] Mentanargrunnur Landsins verður stjórnaður av nevnd við 5 limum, sum landsstýrismaðurin tilnevnir. Landsstýrismaðurin tilnevnir 5 varalimir. Tveir av nevndarlimunum og tveir av varalimunum skulu tilnevnast eftir tilmæli frá Listafólkasambandi Føroya.

*Stk. 2.* Nevndin umsitur sjálvstøðugt játtanina á fíggjarløgtingslógini og aðrar inntøkur.

*Stk. 3.* Nevndin ásetir gjøllari reglur fyri virksemi sítt í starvsskipan, ið skal góðkennast av landsstýrismanninum.

*Umsóknir*

**§ 3.** Nevndin kunnar almenningin um møguleikan at søkja um stuðul úr grunninum og skal seta eina freist at lata umsóknir inn.

*Stk. 2.* Umsókn verður skrivað á umsóknarblað Mentanargrunsins.

*Starvsløn*

**§ 4.** Endamálið við starvslønunum er at geva listafólkum og øðrum, ið takast við mentanarligt virksemi arbeiðsnáðir í eitt ávíst tíðarskeið at starvast burturav við listarligum ella øðrum mentanarligum arbeiði.

*Stk. 2.* [1)] Starvsløn verður latin umsøkjara við støði í verkevni ella verkætlan, sum lýkur krøvini í § 1 í løgtingslógini og eftir nevndarinnar meting av listarligum ella fakligum dygdareyðkennum.

*Stk. 3.* [1)] Starvslønir kunnu verða latnar soleiðis:

1) Ein starvsløn galdandi í 3 ár.
2) Tvær starvslønir galdandi í 1 ár.
3) Starvslønir galdandi í 1 til 6 mánaðir.

*Stk. 4.* Starvslønin um mánaðin svarar í upphædd til læraraløn á fólkaskúlans lønarstigi 21, stig 1.

*Stk. 5.* Nevndin ger sjálv av, hvussu nógvar starvslønir verða latnar, tó skal samlaða útreiðslan til starvslønir fyri eitt játtanarár ikki verða meira enn helmingurin av samlaðu játtanini til Mentanargrunn Landsins.

*Listafólkaløn* [1)]

**§ 4 a.** [1)] Endamálið við listafólkalønunum er at bøta um korini hjá yrkislistafólkum, sum í játtanarskeiðnum burturav arbeiða við list. Útgangsstøðið er, at listafólkini skulu arbeiða í minsta lagi í 3 ár. Møguleiki er fyri, at hesar listafólkalønir kunnu latast tríggjar ferðir, t.e. at eitt setanarskeið varir í mesta lagi 9 ár.

*Stk. 2.* Listafólkalønir verða veittar umsøkjara við støði í verkevni ella verkætlan, sum lýkur krøvini í § 1 í løgtingslógini og eftir nevndarinnar meting av listaligum ella fakligum dygdareyðkennum. Tó kunnu listafólkalønir verða veittar við støði í listaligari fakligheit ella royndum hjá umsøkjara.

*Stk. 3.* Nevndin fyri Mentanargrunn Landsins setir faknevndir, sum viðgera umsóknirnar um listafólkalønir og gera tilmæli til nevndina fyri Mentanargrunn Landsins. Faknevndirnar skulu verða mannaðar við útbúnum fakfólkum innan ávísu listaøkini.

*Stk. 4.* Yrkislistafólk eru tey, sum hava lokið viðurkenda yrkisfakliga útbúgving ella hava samsvarandi royndir innan listaliga økið.

*Stk. 5.* Listafólkalønin um mánaðin svarar í upphædd til læraraløn á fólkaskúlans lønarstigi 21, stig 1.

*Íverksetanarstuðul*

**§ 5.** Endamálið við íverksetanarstuðlinum er at stuðla einstaka skapandi yrkislistafólkinum, serliga ungum listafólki. Íverksetanarstuðulin skal lætta um hjá evnaríkum listafólkum at koma víðari við teirra skapandi listararbeiði.

*Stk. 2.* Íverksetanarstuðul verður latin eftir nevndarinnar meting av listarligum dygdareyðkennum.

*Stk. 3.* [1)] Íverksetanarstuðul er á kr. 75.000,- árliga. Íverksetanarstuðulin kann nýtast til tilfar, leigu av atelier, námsferðir, livikostnaði o.tíl.

*Stk. 4.* Íverksetanarstuðul kann bert latast sama persóni eina ferð og í mesta lagi fyri tvey ár.

*Stk. 5.* Nevndin ger sjálv av, hvussu nógvir íverksetanarstuðlar verða latnir, tó skal útreiðslan til íverksetanarstuðul ikki verða meira enn 10% av samlaðu játtanini til Mentanargrunn Landsins.

*Verkætlanir og mentanarligt virksemi sum heild*

**§ 6.** Stuðul til ymiskar verkætlanir og stuðul til vanligt mentanarligt virksemi sum heild verður latin eftir umsókn til Mentanargrunn Landsins.

*Stk. 2.* [1)] Nevndin ger, við atliti at § 1 í løgtingslógini, sjálv av, hvørjar umsóknir verða stuðlaðar, og hvussu stórur stuðulin skal verða í hvørjum einstøkum føri.

*Treytir o.a.*

**§ 7.** [1)] Stuðulsmóttakari skal lata nevndini fyri Mentanargrunnin roknskap og frágreiðing, eftir at tiltakið er av, tó í seinasta lagi 1. apríl árið eftir játtanarárið. Henda áseting er eisini treyt fyri nýggjari tilsøgn.

*Stk. 2.* Gongur verkætlan yvir fleiri ár, verður frágreiðing at meta sum ávegisfrágreiðing, sum verður latin Mentanargrunninum hvørt ár.

*Stk. 3.* [1)] Tey, sum fáa starvsløn ella listafólkaløn skulu bert lata inn frágreiðing ella ávegisfrágfreiðing.

*Stk. 4.* [1)] Hevur tann, sum fær starvsløn ella listafólkaløn fingið annan stuðul, letur hann inn roknskap fyri hendan partin eftir vanligu reglunum.

*Gildiskoma*

**§ 8.** Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Undirvísingar- og Mentamálastýrið, 21. september 2000

**Torbjørn Jacobsen (sign.)**
landsstýrismaður

/ Jóannes Dalsgaard (sign.)

---

[1] Broytt við kunngerð nr. 156 frá 12. desember 2017.